Hálvur føroyingur í Smðjuni í Lítluvík:

# Málar seg út úr myrkrinum



*– Tá ið eg so geri mynstrini, skavi eg hvíta litin undan aftur tí svarta, og soleiðis »heinti« eg mínar myndir innanífrá – ella »ud af mørket«, sum Kirsten Mørup Jeppesen, listarkvinna, tekur til*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Listarkvinnan, Kirsten Mørup Jeppesen, sum er hálvur føroyingur, var ikki heima í Føroyum í samfull 35 ár. Síðan hevur hon verið fleiri ferðir í Føroyum og vitjað, og hetta er fimtu ferð, hon sýnir fram sína list í Smiðjuni í Lítluvík**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mamman er úr Kvívík, og pápin er dani. Hon hevur búð í Danmark alla sína tíð. Sum smágenta vitjaði hon nógv í Føroyum, men síðan 1965 og 35 ár fram, var hon ongantíð her heima á klettunum. Seinnu árini hevur hon tó fleiri ferðir vitjað aftur og framsýningin, hon í hesum døgum hevur í Smiðjuni í Lítluvík, er hennara fimta í Smiðjuni.

Mamman eitur Alma Nielsen. Hon er 89 ára gomul og býr framvegis í Danmark.

Pápi Kirsten er deyður.

## Øðrvísi list

Framsýningin hjá Kirsten Mørup Jeppesen í Smiðjuni í Lítluvík letur upp í dag, og hon er opin til týsdagin, 25. apríl.

Heitið á framsýningini er »Ud af mørket«, og framsýningin fevnir um tilsamans 35 oljumálningar og 25 akvarellir.

Øll listarverkini í niðara rúminum í Smiðjuni eru svørt og hví. Tey eru serstøk og rættiliga forvitnislig.

– Eg haldi, at tú fært eina sterkari mynd við at »holde igen«, sum hon tekur til.

Tey svørtu og hvítu listarverkini byggja á ymisk mynstur, og á summum verkum er eisini tekstur.

– Mær dámar, tá ið fólk nerta við míni listarverk, og eg haldi, at sjálvt fólk, sum ikki síggja – ella ikki síggja serliga væl, kunnu fáa nakað burtur úr teimum. Tú følir mynstrini og strukturin við fingrunum.

Kirsten sigur, at hon hevur málað tey svørt/ hvítu listarverkini í dagsljósi.

– Tað, sum eg máli, kemur innan úr mær sjálvari, og eg haldi, at tað liggur nógvur »tónleikur« aftanfyri mínar myndir.

Tá ið hon málar hvít mynstur á svarta bakgrund, málar hon fyrst løriftið hvítt. Síðan verður svarti liturin málaður útyvir.

– Tá ið eg so geri mynstrini, skavi eg hvíta litin undan aftur, og soleiðis »heinti« eg mínar myndir innanífrá – ella »ud af mørket«, sum hon tekur til.

## Einki órógv

Í niðara rúminum í Smiðjuni í Lítluvík hevur dekkað vindeyguni, sum venda yvir ímóti Grím Kambandsgøtu av við listarverkum.

– Eg haldi, at tað órógvar »stemningin«, at tey, sum detta inn á gólvið, síggjar bilar og fólk strúka fram við úti á vegnum.

Men, leggur hon aftrat:

– Eg vil gjarna síggja oman á vestaruvág, og tí hanga eingi listarverk fyri tey vindeyguni, sigur Kirsten Mørup Jeppesen, sum dámar væl at vitja í Føroyum.

– Ja, eg eri rættiliga farin at kenna meg heima aftur í Føroyum, sigur hálvi føroyingurin, sum í hesum døgum sýnir fram sína forvitnisligu list í Smiðjuni í Lítluvík.

# – Tað er so deilig til tað sum man

*Óli Simonsen hevur fingið sína fyrstu trílembu. Í fýra ár hevur ærin fingið tilsamans 9 lomb*



**Óli Simonsen, sum er pensjóneraður lærari, heldur, at lombini gerast minst líka so góð um heystarnar, hóast tey ikki súgva ærnar alt summarið og út á heystið. Seinnapartin í gjár fekk hann sína fyrstu trílembu tey umleið 20 árini, hann hevur fingist við seyð**

LEMBINGARTÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár lembdi ein heimaær hjá Óla Simonsen í Saltangará trý veðurlomb.

Hetta hevur verið honum ein góð ær. Hon er fýra ára gomul og hevur við teimum trimum lombunum í gjár fingið tilsamans 9 lomb.

Óli hevur fingist við seyð í fleiri ár, og hetta er fyrstu ferð, at hann hevur havt eina trílembu.

## Stórur áhugi

Óli Simonsen hevur tvær heimaær, og hin ærin hjá honum lembdi tvey lomb, eitt veðurlamb og eitt gimburlamb, 2. apríl. Tey bæði lombini eru frísk og røsk, og alt bendir á, at lombini, hann fekk í gjár, eisini eru væl fyri.

– Eg havi heimaærnar her rundan um húsini hjá



*Óli er aktivur í gongufelagnum í Eysturoy. Her er hann á útferð í Skúvoy*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*